## Umsóknarblað

Umsóknarblað til tænastu, er á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu.

Í umsóknini gevur borgarin loyvi til eitt sjálvvirkandi gjald av tænastuni.

Søkt verður á Vanganum, ella við at senda umsóknarblað til:

**Heilsu- og umsorganartænastuna**
Postboks 32 • FO-110 Tórshavn




Februar 2024

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

### TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Postsmoga 32
FO-110 Tórshavn
+298 302010
torshavn@torshavn.fo

### UPPLATINGARTÍÐIR

Mánadag-hósdag 9.00-16.00
Fríggjadag 9.00-15.00

Leygardag og sunnudag stongt

UMSORGAN OG RØKT

# Dagtilboð til eldri borgarar





**Kjarnuuppgávan hjá Heilsu- og umsorganartænastuni er við miðvísari umsorgan, tænastu, heimatænastu, heilsu- og sjúkrarøkt at stuðla borgaran soleiðis, at hann gerst virkin og vakin alt lívið.**

**Heilsurøkt og umsorgan er eitt týdningarmikið málsøki hjá Tórshavnar kommunu, sum vil ganga á odda og veita skjóta og góða heildartænastu.**

UMSORGAN OG RØKT

# Dagtilboð til eldri borgarar

**Fýra skipaði dagtilboð eru til aldrandi borgarar, sum ikki hava møguleika at luttaka í teimum tilboð sum Tórshavnar Kommuna annars bjóðar eldri borgarum, t.d Tilhaldið.**

Endamálið við dagtilboðunum er, at skapa møguleikar fyri, at eldri kunnu vera virkin, vera saman og vera hugbundin, og soleiðis vera við til at stuðla undir einum virknum og innihaldsríkum gerandisdegi.

Dentur verður lagdur á rørslu, kost, heilsustimbran og fyribyrging, og at allir borgarar skulu kenna seg sum part av felagsskapinum.

Hetta er eitt visiterað tilboð, og tí má søkjast um dagtilboð.

## Kostnaður

Eitt gjald er ásett fyri tilboðið.

Íroknað gjaldið er flutningur til og frá bústaði, drekka og døgurði.

## Demens

Stjørnulon og Tjarnarlon eru tilboð til eldri fólk við demens. Dentur verður lagdur á trivnað og lívsgleði, hóast minni er viknað.

**STJØRNULON**
Jøkulsstræti 4, tlf. 318109 ella 218109

Opið er kl. 9.00-21.00

Pláss er fyri 16 fólkum, ávíkavist 8 fólk um dagin og 8 fólk um kvøldið.

| | | |
|---|---|---|
| Um dagin: | Mánadag til hósdag | kl. 11.30-15.00 |
| | Fríggjadag | kl. 9.00-15.00 |
| Um kvøldið: | Mánadag til hósdag | kl. 15.00-21.00 |
| | Fríggjadag | kl. 15.00-19.00 |

**TJARNARLON**
Stoffalág 84, tlf. 790067

Opið er kl. 9.00-16.00
tó fríggjadag kl. 9.00-13.00

Pláss er fyri 10 fólkum dagliga.

## Virkis og venjingarstovur

Tvær virkis- og venjingarstovur eru, har fólk hava møguleika at hugna sær og at gera ymisk ítriv sum gevur meining fyri tey. Tað kann t.d vera fimleik, gongutúrar í nærumhvørvinum, handarbeiði, dansur, sangur, hugnaløtur, bob ella dart.

**LÁGARGARÐUR**
Stoffalág 84, tlf. 210714

| | | |
|---|---|---|
| Opið er: | Mánadag, mikudag | |
| | og hósdag | kl. 9.00-16.00 |
| | Týsdag | kl. 11.00-16.00 |
| | Fríggjadag | kl. 9.00-13.00 |

Pláss er fyri 60 fólkum, 30 dagliga.

**BOÐANESHEIMIÐ**
Yviri við Strond 95, tlf. 213914

| | | |
|---|---|---|
| Opið er: | Mánadag | kl. 11.30-16.00 |
| | Týsdag, mikudag | |
| | og hósdag | kl. 9.00-16.00 |
| | Fríggjadag | kl. 9.00-13.00 |

Pláss er fyri 20 fólkum, 10 dagliga.